# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Vit eru sera fegin, tí øll viðgerðin gekk eftir ætlan, ja, betur enn vit tordu at vóna*
*( Sharanu Patil, skurðlækni)*

# Nú hevur Lakshmi tvey bein og tveir armar

**Í morgun vóru indisku læknarnir lidnir við skurðviðgerðina, sum eydnaðist væl**



*Soleiðis sá Lakshmi út, áðrenn hon varð løgd undir skurð gjáramorgunin*

Tað tók teimum meiri enn 30 læknunum eitt samdøgur at taka tvey bein og tveir armar av teirri tvey ára gomlu gentuni, og tað var ein fegin yvirlækni, sum hitti fjølmiðlarnar í morgun.

- Tað gekk nógv betur enn væntað, segði Sharanu Patil, skurðlækni, sum hevði staðið á odda fyri viðgerðini. Hann greiddi frá, at eingir óvæntaðir trupulleikar høvdu verið undir viðgerðini.

- Sjálv skurðviðgerðin gekk stak væl, og tað eydnaðist okkum eisini at skilja teir samanvaksnu ryggjageiðslarnar sundur, so hon sleppur undan at fara undir skurð fyri tað eina ferð afturat, segði Patil.

Lakshmi hevði tað, sum læknavísindin rópar isciopagus. Hon var annar av tvíburðum, men menningin hjá hinum fostrinum steðgaði, og tað vaks saman við Lakshmi ístaðin fyri.

## Flyta fólk av oljupallum

**Veðurmenninir siga frá illveðri í Norðsjónum, og tað fær oljufeløg at flyta fólk av pallunum**

British Petroleum hevur gjørt av at flyta umleið 150 fólk av pallum á Valhall-leiðini, sum er einar 180 fjórðingar í útsynning úr Stavanger. Umleið 30 fólk verða eftir á pallunum.

ConocoPhilips ætlar at flyta fólk av pallum á Ekofisk-leiðini. Har arbeiða umleið 1.400 fólk, men tað er ikki greitt, hvussu mong teirra skulu flytast til lands.

Norska veðurtænastan væntar illveður fríggjanáttina, men kortini ikki ódnarveður. Roknað verður við, at aldan kann koma upp í ellivu metra hædd.

## Svensk embætisfólk brúka svart arbeiði

**Ein stórur partur av teimum ovastu embætisfólkunum í svensku stjórnarumsitingini hava goldið fyri svart arbeiði**



*Fredrik Reinfeldt hevur nóg mikið at gera við at rudda gølur av vegnum*

Tann seinasta vikan hevur verið strævin hjá svenska forsætisráðharranum, Fredrik Reinfeldt.

Fyrst komu myndir, sum vístu, at hansara næsti medarbeiðari, ríkisskrivarin Ulrica Schenström, hevði sitið og fjasað við einum tíðindamanni á einum vertshúsi um somu tíð, sum hon hevði ovastu ábyrgdina av landsins krepputilbúgving.

Reinfeldt hevði vallað fingið tað málið av vegnum, tá fjølmiðlarnir avdúkaðu, at Nicola Clase, sum júst hevði tikið við eftir Ulriku Schenström, hevði havt fólk í arbeiði og goldið teimum svarta pengar afturfyri. M. a. hevur hon havt fólk til reingerð og barnaansing og golfið teimum 60.000 krónur uttan um skattaskipanina.

Blaðið Expressen skrivar, at Nicola Clase er kanska tann størsti syndarin, men einsamøll er hon ikki. Tí sambært blaðnum hava 15 av teimum 33 ríkisskrivarunum havt fólk í arbeiði og goldið teimum samsýning uttan um skattaskipanina.

## STUTT SAGT

### Doyðu í bátinum

Sjóverjan í vesturafrikanska landinum Mauritania kom í gjár fram á tveir bátar við flóttafólki, sum vóru flýdd úr Senegal, og sum ætlaðu sær til Kanarisku Oyggjarnar og síðani til Evropa. Í øðrum bátinum fann sjóverjan 47 deyð fólk, og fleiri av hinum fólkunum vóru illa á holdum komin. Í hinum bátinum vóru tey flestu á lívi, og øll verða nú send aftur til Senegal, siga mauritansku myndugleikarnir. Sambært sponsku myndugleikunum er hetta ein tann størsta bátsvanlukkan við flóttafólki úr Vesturafrika.

### Óvanlig halastjørna

Edwin Holmes-halastjørnan er nú so klár, at í góðum sýni sæst hon við berum eygum. Stjørnan er uppkallað eftir Edwin Holmes, sum rakti við hana í 1892. Í mong ár hildu fólk, at hon var horvin, tí hon var ikki at síggja, men í 1964 funnu vísindafólk hana aftur. Síðani hevur hon verið at síggja við sjey ára millumbili, og fyri einari góðari viku síðani kom hon aftur á himmalin. Tann 24. oktober var hon sera klár, men vísindin dugir ikki at siga, hví so var. Tey, sum hava skil fyri stjørnuhimmalinum, siga, at Edwin Jolmes-halastjørnan kann síggjast við at hyggja upp á luftina í ein landnyrðing.

### Fekk góða lønarhækking

Uttan stórvegis orðaskifti hevur franska tjóðartingið samtykt at hækka lønina hjá Nicolas Sarkozy, forseta 172 prosent, skrivar blaðið Le Monde. Ein av grindgevingunum var, at forsetin eigur at fáa á leið somu løn sum forsætisráðharrin. Eftir hækkingina fær Sarkozy 240.000 evrur ella 1,8 mió. krónur í løn um árið. Herumframt rindar tað almenna at kalla allar útreiðslur, ið standast av forsetaembætinum.